# Norðmenn bæði



Teir báðir Torbjørn Joensen og Ólavur Hátún framman fyri Svíningin, sum liggur so prúður millum fínar seglbátar í Asker í Noregi

**Fyri fjórðu ferð hevur Ólavur Hátún verið uttanlands við 10-mannafarinum »Svíningi«, men í mun til fyrru ferðirnar valdi hann hesaferð at sigla allan vegin úr Føroyum til Noregs og aftur**

FERÐAHUGUR
*Leo Poulsen*
*Myndir: Ólavur Hátún*

– Eg havi altíð verið sera hugtikin av føroyska bátinum. Eg eri uppvaksin í Svínoy at kalla undir liðini á besta bátabyggjara í Føroyum, Poul Johannes Poulsen úr Svínoy. Faðir hansara var úr Mikladali, so tað er haðani, at kunsturin at smíða bát stavar.

Tað sigur Ólavur Hátún, nú hann er komin aftur av drúgvari útferð. Og hetta er ikki tann vanliga útferðin, tú ger niðan á onkran hissini heyg ella út í eina av smærru oyggjunum í Føroyum. Nei, hetta er útferð við lít.

– Tað byrjaði upprunaliga rættiliga tilvildarligt. Hugsi tað var í 1992, at Smyril Line lýsti við, at ein kundi fáa bátin fluttan við Norrönu til Noregs fyri lítið og lætt, so eg meldaði meg til beinanvegin, sigur Ólavur Hátún.

Hetta tiltakið var kortini ikki nøkur avgjørd succes, tí »Svíningur« var einasti bátur, sum skipið flutti tað árið.

Men Ólavur og familjan høvdu ein fínan túr, og tað gav hug og áræði at royna hetta aftur. Og tað gjørdi kórleiðarin longu árið eftir, tá hann og sonurin fóru yvir til Noregs aftur. Frá Bergen sigldu teir suður um Stavanger suður til Lindesnes og hagani hildu teir leiðina tvørtur um Skagerak móti Hanstholm.

Á hesum túrinum høvdu teir bara kumpass at dúva upp á, men væl var rakt. Síðani gjøgnum Limfjørðin til Århus og síðani í summarhús á Norðursælandi. Eftir ein steðg har, gekk leiðin eystur til Keypmannnahavn at sigla í kanalunum har áðrenn leiðin lá norður í svenska skergarðin.

Á leiðini aftur til Bergen rendu teir seg í óveður, sum teir máttu baksa seg ígjøgnum heilt frá Lindesnes upp til Stavanger, tí á teirri leiðini er eingin skergarður at verja móti havalduni.

## Hetland gav hugskot

Aftur í 2002 legði Ólavur Hátún til brots, hesaferð til Hanstholm. Síðani gjøgnum Limfjørðin og eystur gjøgnum Oyrasund upp við svensku eysturstrondini til Nem. Hagani upp gjøgnum Götakanalina til Vänern og Vättern, størstu vøtn í Svøríki, ið eru sum høv at sigla ígjøgnum.

Seinni gekk leiðin longur upp í Svøríki til Dalslandskanalina, sum teir sigldu upp eftir.

– Tá upplivdu vit toruveður sum ongantíð áður ella síðani. Vit vóru rættiliga heitir um oyruni, tí vit vistu ikki hvat var til ráðar at taka, antin at liggja mitt úti á kanalini, ella søkja inn til áarbakkan, sigur Ólavur Hátún.

Ta ferðina valdu teir at flyta bátin á trailara til Holden uttast í Oslofjørðinum


Her sigla teir tætt framvið einum boripalli í Norðsjónum

